# Barometrið er í topp

**Ein seinnapartur við reportarunum hjá Barometrinum**

REPORTASJA

*Ingrid Bjarnastein & Brynhild H. Reinert, praktikantur*



*Niðri í rundkoyringini á keiini. Eitt sindur av baksi, men skjótt riggar alt sum tað skal og reportarnir eru at hoyra í útvarpinum*

Hvønn seinnapart í summar hevur Barometrið verið í luftini. Ein væl løtt og vælumtókt sending við innsløgum, kappingum, temadøgum, tónleiki og øðrum.

Týsdagin vóru vit ein túr við teimum báðum reportarunum, Hera Jacobsen og Jens Tummas Næss, meðan teir koyrdu runt í býnum og gjørdu beinleiðis innsløg til sendingina.

Lagt var fyri uppi í útvarpinum. Eitt sindur áðrenn klokkan trý er ruðuleiki. Billyklarnir eru horvnir, um eina lítla løtu skal slagið byrja niðri á fasta plássinum – rundkoyringini við pylsuvognin á keiini.

Eitt sindur av rennaríið her og har, lyklarnir koma aftur í aftur, og so er ikki nógv annað at gera, enn at leggja til brots.

Útvarpsbilurin stendur klárur í túninum og bíðar. Hetta man hann vera vanur við.

Vit koyra Yviri við Strond, og eitt, tvey, trý so standa vit niðri við rundkoyringina. Nú er klokkan trý.

– Í dag eru vit tíðliga á veg, sigur Jens Tummas skemtandi. – Vanliga plagar tað at vera soleiðis, at vit parkera bilin og leypa út í rundkoyringina og so beinleiðis í luftina. Men í dag liggur heldur betri fyri.

Eftir eitt sindur av baksi við sendara og mikrofon riggar alt endiliga sum tað skal, og nú eru teir í luftini. Eingin av teimum, sum situr og lurtar hevur ánilsi fyri, alt stríðið og roksið sum hevur verið frammanundan, og teir báðir ljóða, sum teir hava staðið klárir niðri í rundkoyringini í fleiri tímar.

Lagið er gott, og tey skemta allatíðina. Nógvir bilar koyra framvið hesa løtuna. Helst er tað tí, tey vilja síggja reportararnar báðar. Men tað eru ikki bert reportaranir, sum eru í góðum lag. Hetta er eisini galdandi fyri fólkini, sum ganga og koyra framvið. Bilarnir floyta og fólkini heilsa. So vit kunnu siga, at reportararnir eru sera væl umtóktir.

## Innsløg

Tað er verri enn so ikki hvønn dag, at øll innsløgini eru fyrireikað, men í dag eru vit heppin. Fleiri avtalur eru gjørdar, so teir vita, hvagar leiðin liggur eftir byrjanina niðri í rundkoyringini.

Fyrsta stopp: Blindastovnurin. Her tosa teir við Una Rasmussen, ið er massør, ella vøddamýkjari, sum tað eitur á føroyskum.

Lagið er gott allan vegin. Smædnir eru teir heldur ikki, so tað fær fólk, ið eru á vegnum ella til gongu at venda sær, hyggja, og kanska enntá smílast eitt sindur.

Frá Blindastovninum leggja vit leiðina út á Fóm Ís. Her sita tveir av bilførarunum, Jens og Katja, og drekka kaffi. Tey hava kaffisteðg nú, men arbeiði teirra er at koyra ís kring alt landið. Meðan tosað verður um ís, fær ein av reportarunum eitt hugskot. Hann heldur, at tað hevði verið eitt gott hugskot, um Fóm fór at koyra við »hjemmeis«.

Eisini sleppa vit ein túr inni í frystirúmið, har allir ísarnir eru. Og reportararnir fáa tvær ístertur heim við aftur.

Á veg út í Blákrossbúðina skemta reportararnir ófØrt. Teir eru í góðum lag og finna allatíðina upp á okkurt stuttligt.

Blákrossbúðin er ein handil, ið selir endurnýtslu klæðir bíliga. Her eru nógv fólk komin. Tey venda sær øll forvititn, tá tey síggja reportararnar – smílast eitt sindur, men vilja ikki rættiliga gera vart við seg.

– Fólk ræðast mikrofonina, sigur Jens Tummas. – So skjótt sum tey síggja eina mikrofon, so eru tey vekk.

Tá reportararnir hava leitað eina góða løtu finna teir umsíðir onkran at tosa við. Og nú vil Heri hava nýggj klæðir. Tað tekur leingi at finna tað heilt rætta, men hann fær góða hjálp. Tá alt kemur til alt hevur hann keypt sær einar brúnar buksur, eina gula skjúrtu og ein jakka. Slipsið fær hann ókeypis. Nú er hann sum spildurnýggjur, og alt fekk hann fyri bara 80 krónur. Hesi klæðini høvdu kostað væl yvir 1000 krónur, hevði hann skulað keypt tey nýggj.

Seinasta innslagið er komið undir land, og nú gongur leiðin oman aftur har reportararnir báðir byrjaðu sendingina.

Klokkan nærkast fimm, og reportararnir standa klárir niðri í rundkoyringini. Nógv fólk er komið oman, og nógvir bilar koyra framvið. Og meðan Heri gongur »catwalk«, floyta bilarnir. Seinastu minuttirnir hjá reportarunum eru í luftini, og nú er enn ein sending liðug. Nú er ikki nógv eftir. Nakrar fáar sendingar afturat, og so fer barometrið í dvala. Men eitt er vist. Spitarin hevur verið í botni (ikki bókstaviliga) í alt summar.



*Fyrsta stoppið var Blindastovnurin. Her varð prátað við Una Rasmussen*



*Niðri í Blákrossbúðini vóru tey bæði blíð og týð*



# Akraberg farin undir pólskt flagg

**- Tað er heilt greitt, at tonsatalið, sum skuldi liggja til grunds fyri eykakvotu til Føroyar, snúði seg bert um føroyska og grønlendska veiði og ikki um veiðina hjá øðrum tjóðum, sum fiska av grønlendskari kvotu, sigur Anfinn Olsen, sum var við til at gera uppleggið til hendan partin av avtaluni millum Føroyar og Grønland.**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*



*Akraberg fiskar nú av pólskari kvotu í Irmingarhavinum. Flaggskiparin er póllendingur, men tað er Eyðun á Bergi, sum hevur leiðsluna á brúnni.*

*Tá ið skipið kemur aftur úr Irmingarhavinum, verður farið í Barentshavið*

Tá ið einki røktist fyri, at semja spurdist burtur úr toganini millum føroyskar og grønlendskar myndugleikar um kongafiskakvotuna í Irmingarhavinum, avgjørdi reiðaríið, sum eigur Akraberg, at lata skipið fara undir pólskt flagg.

Akraberg er nú í Irmingarhavinum og fiskar av pólskari kvotu.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at fiskiskapurin hevur verið hampiligur, og hann roknar við, at skipið verður verandi í Irmingarhavinum í ein mánaða ella so.

- Men alt valdast veðurlagið, sum er ringt á leiðini, tá ið tað líður út. Roynt verður einar 200 fjórðingar úr Hvarvinum, og hetta er vánalig havleið til veður, tá ið veturin nærkast. Tað longsta, vit hava roynt á hesi leiðini, er nakað út oktober, sigur hann.

Við Akrabergi hendan túrin eru 29 mans. Ein póllendingur er við; tað er flaggskiparin. Skipari á Akrabergi er Eyðun á Bergi.

Kongafiskurin verður skráskorin umborð og seldur til Japans.

Tá ið Akraberg kemur aftur úr Irmingarhavinum, fer skipið í Barentshavið at royna.

## Vónsvikin reiðari

- Seinast, eg frætti úr landsstýrinum, var kvotumálið ikki slept, men tað er greitt, at so hvørt tað líður út, gerst føroyska kvotan minni attraktiv.

Anfinn, sum sjálvur var við at gera uppleggið í avtaluni millum Føroyar og Grønland um tey 500 tonsini eyka, sigur, at í hansara verð er eingin ivi um, hvussu avtalan skuldi tulkast.

- Tað er heilt greitt, at tonsatalið, sum skuldi liggja til grunds fyri eykakvotu til Føroyar, snúði seg bert um føroyska og grønlendska veiði og ikki um veiðina hjá øðrum tjóðum, sum fiska av grønlendskari kvotu.

Hann er tí vónsvikin av, at grønlendskir myndugleikar hava tulkað avtaluna so misvísandi, at eingin eykakvota spurdist burtur úr til føroyingar.

- Tað er eingin ivi um, at embætismenninir, sum vóru við til at gera hendan partin av avtaluni, vóru greiðir yvir, hvat avtalan snúði seg um, sigur Anfinn Olsen, reiðari.

# Nýggi Stapin nærkast

**- Við nýggja skipinum fáa vit eitt heldur størri og væntandi betri skip, sigur reiðarin.**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*



*Nú nógv arbeiðstilboð eru á landi, er skilagott at geva teimum sum sigla, betri umstøður umborð, so fólkið kann støðast uppaftur betri. Stapin verður nú skiftur út við eitt nýggjari og betri skip*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í dag fer Anfinn Olsen, reiðari, til Danmarkar at rigga til heimferðina hjá línubátinum, sum P/F Regn á Toftum hevur keypt úr Íslandi.

Skipið er upprunaligt bygt til norðmenn í 1988, men hevur eisini verið heimahoyrandi í Íslandi.

Navnið á „nýggja" línubátinum hjá toftamonnum verður Stapin, og hann kemur inn í fiskiskipaflotan fyri gamla Stapan, sum tá einki fiskiloyvi hevur.

Hvat verður av Stapanum, er ikki greitt enn, men fær P/F Regn eitt hóskandi boð, verður hann væntandi seldur.

Spurdur, hvussu gongdin hevur verið hjá gamla Stapanum seinnu árini, sigur Anfinn, at hon hevur verið á góðari leið.

– Við nýggja Stapanum fáa vit eitt heldur størri, nýggjari og væntandi betri skip, sigur reiðarin.

Nýggi Stapin liggur í Skagen og kemur væntandi til Føroya um einar 3-4 vikur. Við skipinum verða 12-14 mans.

Skipari verður framhaldandi Brandur Højgaard, sum byrjaði rættiliga ungur at føra skip.

# Emil helt „sambandið" longst

HVALAKANNING

*Vilmund Jacobsen*

Tann seinasti av tilsamans seks hvalum, sum vórðu radiomerktir í Noregi, 1. desember í fjør, sleit sambandið við Havgranskingarstovnin, 31. juli. Í 243 samdøgur hevði granskingarstovnurin samband við Emil, sum tey valdu at kalla hvalin. Soleiðis kundu tey eisini fylgja honum allastaðni, har hann ferðaðist á havinum.

Meðan stovnurin hevði samband við Emil, sendi radiosendarin, sum var festur á hvalin, javnan upplýsingar um, hvar hvalurin var staddur.

Síðan desember í fjør hevur Emil ferðast framvið norsku strondini og uppi í Norska havinum.

Hesir 243 dagarnir er longsta tíðarskeiðið, granskarar í Noregi høvdu samband við ein av merktu hvalunum.

## Longd kanning

Nú fer Havgranskingarstovnurin at greina upplýsingarnar, sum stovnurin hevur fingið. Tó halda tey, at neyðugt verður við uppaftur fleiri upplýsingum, um ein fullgóð mynd skal fáast av, hvussu hvalurin ferðast í mun til, hvussu eitt nú sildin ferðast.

Granskingarstovnurin í Noregi ætlar tí at leingja hesa hvalakanningina fram til endan av komandi ári.